**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



mátti útseta tað. Mamma mín hevur tó allatíðina ætlað at givi sína fløgu út nú.

- Eg havi faktiskt arbeitt við hesari fløguni alt lívið, havi droymt um tað, síðani eg var fimm ára gomul, sigur Anna. Eg setti mær fyri, at eg skuldi geva eina fløgu út, áðrenn eg fylti 40. Eg bleiv so meira enn 40, og eingin fløga kom. Men so í mai 2007 hendi nakað, ið broytti alt. Míni foreldur doyðu í einari ferðsluvanlukku, og tað fekk meg at vilja fara í gongd við fløguna aftur. Eg var byrjað eitt sindur uppá hana áðrenn, men tað gekk ongan veg. Tað var tó ikki, fyrr enn tey doyðu, at eg skrivaði mítt allarfyrsta lag. Tað æt »Onki Summar« og snýr seg um júst tað summarið eftir vanlukkuna; at tað í grundini ikki kom nakað summar hjá mær tað árið. Men myndin í tí er, at sjálvt um tú missir, so koyrir lívið víðari alíkavæl. Fólk dansa, og fuglar syngja, og tú kanst ikki steðga upp. Hetta setti ordiliga gongd á tað heila, og gav mær møguleika til eina nýggja byrjan; faktiskt eitt nýtt lív. Eitt lív uttan bitturheit. Eg valdi eisini beinanvegin at ogna fløguna til tey.

**Produktini broyttust**

- Fløgan er rættiliga melankolsk, greiðir Anna víðari frá. Eg elski jazz, sum eisini hoyrist væl aftur, og í støðum er nokso nógvur bossanova dámur. Fløgan er kanska ikki akkurát tað produktið, sum eg einaferð droymdi um, men eg eri ótrúliga takksom fyri hana alíkavæl og standi 100 prosent inn fyri øllum á henni.

Petur hevur tað nakað uppá sama máta. Hann helt, at tónleikurin hjá sær fór at verða meira skitin og ráður, enn hann í síðsta enda bleiv:

- Produktið broyttist ordiliga nógv í framleiðslu prosessini, sigur Petur. Eg lurti sjálvur mest eftir rættiliga alternativum indie tónleiki, men mín egni tónleikur vísir seg at vera nógv meira popp. Faktiskt hevur tað verið nokso torført at sæð tað í eyguni, og tað hevur eisini tikið eina løtu, men eg havi so funnið útav, at tað faktiskt er nógv feitari, sum tað er nú, enn tað hevði verið, um eg hevði tvingað tað til at vera skitnari. Also: Boys in a Band skal vera skitið. Men mítt skal vera pent og ljóða væl. Og eg eri sannførdur um, at tað klæðir nógv betri hendan nýggja ófesjuta hamin. Tað er Hans Poulsen, ið hevur framleitt fløguna, og Óli Poulsen, ið hevur miksað hana. Teir vilja hava skil á tingunum og hava fingið tað at ljóða knasandi væl. Betri, enn eg hevði trúð.

**Boðskapur og marknaðir**

Fyrst og fremst skulu »Nakið« og »See Inlaid Heart For Details« gevast út í Føroyum, og tá gongd er komin á her heima, verður hugt út um landoddarnar.

- Vit vóna fyrst og fremst at fáa tað at mæla runt í Føroyum. Og so kunnu vit venda eyguni úteftir, sigur petur. Plátufelagið hjá mær er rímiliga heitt uppá at fara út úr landinum at promovera, men spurningurin er bara, hvussu man vil gera tað. Mín fløga er ikki beinleiðis kristin, sjálvt um hon hevur tekstir frá einum kristnum sjónarhorni. Men vit tosa nógv um at fara inn á tann kristna marknaðin. Har er generelt ikki so ringt at sleppa inn, tí úrvalið av ordiliga góðum tónleiki er ikki so stórt. Eg eri bara eitt sindur bangin fyri at stempla mín tónleik »kristnan« og so skera fólk av. Eg vil bara hava fólk at lurta eftir tónleikinum, uttan at tað skal vera religiøst treytað. Eg vil ikki, at nakar skal kenna seg illa. Eg peiki bara fingrar eftir mær sjálvum í tekstunum, eri ógvuliga sjálvkritiskur. Og hetta er nakað, ið eg haldi kann relatera til øll – ikki bara kristna marknaðin. Tað hevði í hvussu er verið feitt at selt eitt sindur her, og so mugu vit bara fáa at síggja, hvat hendir. Eg taki tað ógvuliga róligt og havi ikki høgar forvæntningar. Men um okkurt hendir, eri eg sjálvandi totalt við.

Málbólkurin hjá Onnu er umleið tann sami:

- Fløgan hjá mær inniheldur fleiri kristnar tekstir, men umboðar meira enn bara boðskap til kristin fólk, greiðir Anna frá. Eg vil gjarna, at fólk skulu kunna taka hana til sín fyri tað, sum hon er. Jólini eru ofta keðilig hjá fólki, ið hava mist, og melankoliin í mínum tónleiki kann vónandi vera ein uggi hjá fólki, ið hava tað ringt. Tí sjálvt um ein oftast hevur bestan hug til at gyppa ein stein, so er lívið deiligt. Eg síggi tað soleiðis, at tá okkurt keðiligt hendir, so byrjar ein nýggjur kapittul. Ein fær líkasum møguleika at endurskoða seg sjálvan og sítt lív og kann byrja av nýggjum. Og tað er serliga hendan boðskapin, eg vil fáa út, heldur enn bara at appelera til kristin fólk, sjálvt um tað eisini er ein stórur partur av tí.

**Útgávukonsertir**

Anna og Petur hava ymsar ætlanir um útgávukonsertir, men hava ikki enn avgjørt júst hvussu tey skulu gera; um tey møguliga skulu hava konsert saman ella ikki. Hvussu er og ikki, so kemur fløgan hjá Peturi út í dag, 27. november 2008 og fløgan hjá Onnu í morgin, 28. november 2008.

Far á myspace síðurnar hjá teimum báðum, ið standa her á síðuni, og lurta eftir tónleiki teirra. Vit siga frá her í blaðnum, tá útgávukonsertir eru komnar uppá pláss.







*Petur W. Háberg hevur sniðgivið húsarnar báðar*